## FRISØRAR

**Treytað av m.a. nóg stórari undirtøku, verður skeið hildið í:**

### Nýmótans vanondulation

**Hósdagin 14. og fríggjardagin 15. september 2000**

### Total Look – Heystmóti klipp og litir, makeup og manicure

**Vikuskiftið 16. og 17. september 2000**

**Frálæra/gjald:**
Nýmótans vandondulation
hósd. 14/09 kl. 13.00–16.00
fríggjad. 15/09 kl. 09.00–16.00
kr. 1.750,- íroknað høvd og tilfar

Total Look demonstratión leygardag
16/09 kl. 15.00–18.00 kr. 750,-
Total Look praktik hold I sunnudag,
16/09 kl. 08.30–12.00 kr. 500,-
Total Look praktik hold II sunnudag
17/09 kl. 13.00–16.30 kr. 500,-

**Skeiðleiðari:**
Connie Carstens frá Frisørskolen í København.

**Luttakaratal:**
Hósdag og fríggjadag hægst 12 pr. hold
Leygardag – óavmarkað
Sunnudag – hægst 12 pr. hold

**Tilmelding:**
**áðrenn 1. september 2000**

Luttakarar við sveinabrævi innanfyri frisørfakið kunnu fáa helmingin í studningi frá Undirvísingar- og Mentamálastýrinum.

Luttakarar, ið hava goldið í eftirútbúgvingargrunnin „VITAN“, kunnu søkja um stuðul haðani.

Umsóknarbløð til Undervísingar- og Mentamálastýrið og Vitan fáast á skúlanum.

Fráboðan um luttøku og nærri frágreiðing (eisini um innivist v.m.), fæst við at venda sær til skúlan á tlf. 311957 (mánadag–fríggjadag, kl. 8–12 & 13–16)

**Tekniski Skúlin í Tórshavn**
Marknagilsvegur 75, P.O.B. 239,
FO-110 Tórshavn, tlf. 311957, fax 316621



**DANNY TRANSPORT**

- tá okkurt skal koyrast ella goymast

**Tlf. 319192**


# Norðborg fiska fyri Jupiter

*Norðborg skal helst á sildaveiði fyri Jupiter, sum verður umvældur á skipasmiðjuni á Skála*



*Norðborg*

Í gjár fór gamla Norðborg av Klaksvík, og gongst sum ætla fer skipið á sildaveiði fyri Jupiter.

Jupiter liggur á skipasmiðjuni á Skála, og umvælingin a skipinum tekur longri tíð, enn reiðaríið í fyrstu syftu roknaði við. Sildatíðin er fyri framman, og tí er ein loysn hjá Atla Hansen, reiðara á Jupiter, at leiga Norðborg í eina tíð.

Tað er P/F Christian í Grótunum í Klaksvík, sum eigur gomlu Norðborg, sum hevur ligið við bryggju í Klaksvík, síðani nýggja Norðborg kom til Føroya í februar mánaði.

**Flutti vatn**

Klaksvíkingar hava ikki brúkt gomlu Norðborg, tí teir hava tvey nýggjari skip til sama fiskiskap. Reiðaríið arbeiðir við at selja skipið, men í hesum førði verður tað helst til ein leigusáttmála.

Norðborg hevur síðani februar ligið við bryggju mesta av tíðini, men í ógvusliga turkinum, sum var kring landið herfyri, var Norðborg nýtt til at flyta vatn av Skálafjørðinum og til Fuglafirðar.

Næsta mánaðin verður tað tó væntandi sild, sum Norðborg kemur at hava í lastini.

**ek**

# Framvegis mest konufólk

*Konufólk hava serligan tokka til HF-skúlan í Klaksvík, og í ár eru konufólkini enn einaferð í stórum meiriluta í nýggja flokkinum*

**Klaksvík:** Aftur í ár vera tað nógv fleiri konufólk enn mannfólk, sum byrja á Klaksvíkar HF-skeiði.

Mánadagin byrjar ein nýggjur flokkur, og í hesum flokki verða 18 konufólk og fimm mannfólk. Og sannførandi meirilutin hjá konufólkunum á skúlanum kemur rættiliga fram, tá hugt verður eftir teimum, sum byrja upp á seinna árið mánadagin.

Í teimum báðum 2. flokkunum er eitt mannfólk til hvønn flokk, og restin er konufólk. Samanlagt eru fleiri enn 60 konufólk á skúlanum, meðan mannfólkini eru sjey í tali.

**Ikki sami áhugin**

Í fjør var áhugin fyri HF-skúlanum so stórur, at tveir nýggir flokkar vórðu tiknir inn.

Vanligt hevur verið, at ein HF-flokkur byrjar á HF-skúlanum í Klaksvík hvørt ár, meðan tveir flokkar verða tiknir inn á Kambsdali, men í fjør var øvugt.

Í ár hevur áhugin fyri skúlanum í Klaksvík ikki verið so ovurhonds stórur, sum hann var í fjør, og tí er júst nóg mikið til ein nýggjan flokk. Á Kambsdali byrja tveir nýggir HF-flokkar.

Vanligt hevur verið, at tey, sum søkja inn á HF-skúlan í Klaksvík, sleppa inn, men onkuntíð hevur verið neyðugt at heita á klaksvíkingar um at taka HF á Kambsdali.

Skúlagongdin á HF-skúlanum í Klaksvík byrjar mánadagin klokkan 10.00.

**ek**

# Strákur á beding

**Klaksvík:** Hósdagin kom Strákur til Klaksvíkar, eftir at hann hevur verið fimm vikur í Norðsjónum.

Norsk Hydro brúkar Strákur sum stand-by bát, og uppgávan er at ansa eftir einum rørleidningi.

Fyrst í komandi viku verður Strákur tikin upp á bedingini í Klaksvík, tí botnurin skal reinsast, og um eina viku fer hann væntandi avstað aftur í Norðsjógvin.

Strákur hevur verið nógv í Norðsjónum í ár, og vanligt er at túrarnir eru millum fimm og sjey vikur hvørja ferð.

Fýra mans eru við Strákur.

ek



# Húsfólk í skálanum

Rúnar Reistrup

Í dag letur upp framsýning í Listaskálanum, har átta donsk listafólk sýna verk fram.

Øll átta eru knýtt at »Huset« í Asnæs á Vestursælandi.

Nógv føroysk listafólk hava ígjøgnum tíðirnar havt framsýningar í »Huset« og tí kennir Listasavn Føroya tað partvís sum eitt høvi at takka fyri seinast, at bjóða teimum átta listafólkunum at hava bólkaframsýning í Listaskálanum.

Tey flestu av listafólkunum eru málarar, men onkur teirra fæst eisini við vovna list.

Tey átta listafólkini, ið sýna fram í Listaskálanum komandi dagnar eru: Lisbet Olrik, Austin Corcoran, Oda Knudsen, Ole Finding, Annemette Lichtenberg, Bent Karl Jacobsen, Mette Møller Bovin og Loui Michael.

Framsýningin letur upp í dag, leygardag, klokkan 16.00 og er opin fram til 10. september.

# Spælimenn spælið

Rúnar Reistrup




Spælimenninir í Hoydølum tagna ikki. Treyðugt so, tað er langt síðan at teir hava verið at sæð framman fyri áhoyrarafjøld, men so seint sum í hesi vikuni kom enn eitt veiggj frá teimum spælandi monnunum - og kvinnunum.

Plátufelagið Tutl hevur givið út savnsfløgu við løgum hjá Spælimonnunum upptikin í árunum millum 1977 og 2000.

Løgini eru tíksil nokkso ymisk, eins og manningin broytist mestsum frá lagi til lag.

Fimm plátur liggja handan Spælimenninar í Hoydølum, og tí er tað ikki av leið at plátufelagið Tutl savnar tey bestu løgini á eina fløgu.

# Torbjørn Olsen í Lille Marie

Gallarí »Lille Marie« í Kolding letur í dag hurðarnar upp fyri eini málningaframsýning av føroyska listamanninum Torbjørni Olsen.

Í innbjóðingini til framsýningina verður Torbjørn nevndur »en fin, farvestærk færing« við støði í hansara náttúruíblástu málningum, ið oftast eru málaðir við litum, sum ikki finnast í sínum reina líki í føroysku náttúruni, men stava frá innaru náttúru listamannsins.




-Góðir brúktir frá
**REYNI SERVICE**

| | |
|---|---|
| **TOYOTA CAMRY 2,2 GL** Sýnaður 4/98<br>**Skrás.:** 02-04-98 **Km.:** 24.000<br>**Prísur:** 208.600,- **Garanti**** | **TOYOTA COROLLA 1,6 Gsi SEDAN**<br>**Skrás.:** 22-10-91 **Km.:** 171.000<br>**Prísur:** 50.600,- Sýnaður 1/99 |
| **TOYOTA CARINA 2,0 TDi** Sýnaður 6/99<br>**Skrás.:** 21-06-96 **Km.:** 143.000<br>**Prísur:** 124.600,- **Garanti*** | **TOYOTA COROLLA 1,3 STW.**<br>**Skrás.:** 01-06-92 **Km.:** 82.000<br>**Prísur:** 62.600,- Sýnaður 8/00 |
| **TOYOTA CARINA 2,0 GLi SED.**<br>**Skrás.:** 30-04-98 **Km.:** 24.000<br>**Prísur:** 167.600,- **Garanti**** | **TOYOTA COROLLA 1,3 STATION**<br>**Skrás.:** 13-04-92 **Km.:** 110.000<br>**Prísur:** 57.600,- Sýnaður 2/99 |
| **TOYOTA CARINA 2,0 Gli AUT. GEAR**<br>**Skrás.:** 13-06-96 **Km.:** 82.000<br>**Prísur:** 127.600,- **Garanti*** | **TOYOTA YARIS 1,0 TERRA**<br>**Skrás.:** 07-05-99 **Km.:** 30.000<br>**Prísur:** 112.600,- **Garanti**** |
| **TOYOTA CARINA 2,0 Gli SED.**<br>**Skrás.:** 03-04-96 **Km.:** 122.000<br>**Prísur:** 127.600,- **Garanti*** | **AUDI A4 við leðurinntrekk**<br>**Skrás.:** 01-10-96 **Km.:** 18.000<br>**Prísur:** 185.600,- **Garanti*** |
| **TOYOTA CARINA 1,8 Gli** Sýnaður 12/99<br>**Skrás.:** 28-06-95 **Km.:** 72.000<br>**Prísur:** 108.600,- **Garanti*** | **PEUGEOT 406**<br>**Skrás.:** 12-11-98 **Km.:** 23.000<br>**Prísur:** 168.600,- **Garanti*** |
| **TOYOTA CARINA 2.0 Gli** Sýnaður 3/00<br>**Skrás.:** 02-07-90 **Km.:** 170.000<br>**Prísur:** 65.600,- | **VOLVO 460 SEDAN**<br>**Skrás.:** 25-05-90 **Km.:** 92.000<br>**Prísur:** 48.600,- Sýnaður 6/99 |
| **TOYOTA CARINA 2,0 Gli L/B**<br>**Skrás.:** 14-08-91 **Km.:** 69.000<br>**Prísur:** 72.600,- **Garanti*** Sýnaður 5/99 | **HONDA CIVIC 1,4**<br>**Skrás.:** 07-04-97 **Km.:** 52.000<br>**Prísur:** 110.600,- **Garanti*** |
| **TOYOTA CARINA 1,6 Xli**<br>**Skrás.:** 27-07-92 **Km.:** 131.000<br>**Prísur:** 58.600,- Sýnaður 5/99 | **RENAULT MEGANE 1,6 E**<br>**Skrás.:** 22-05-96 **Km.:** 96.000<br>**Prísur:** 65.600,- |
| **TOYOTA CARINA 1,6 GL SEDAN**<br>**Skrás.:** 07-10-88 **Km.:** 200.000<br>**Prísur:** 44.600,- Sýnaður 5/00 | **FORD ESCORT 1,8 TDi STATION**<br>**Skrás.:** 08-10-97 **Km.:** 24.000<br>**Prísur:** 132.600,- **Garanti*** |
| **TOYOTA COROLLA 1,3 H/B**<br>**Skrás.:** 20-04-99 **Km.:** 7.000<br>**Prísur:** 128.600,- **Garanti**** | **FORD ESCORT 1,8**<br>**Skrás.:** 21-08-95 **Km.:** 81.000<br>**Prísur:** 65.600,- |
| **TOYOTA COROLLA 1,6 L/B**<br>**Skrás.:** 29-12-99 **Km.:** 8.000<br>**Prísur:** 134.600,- **Garanti**** | **FORD MONDEO 2,0 AIR-CON**<br>**Skrás.:** 02-07-96 **Km.:** 52.000<br>**Prísur:** 120.600,- **Garanti*** |
| **TOYOTA COROLLA 1,3 TERRA**<br>**Skrás.:** 16-03-98 **Km.:** 50.000<br>**Prísur:** 112.600,- **Garanti**** | **KIA SEPHIA 1,5**<br>**Skrás.:** 17-04-97 **Km.:** 59.000<br>**Prísur:** 68.600,- |
| **TOYOTA COROLLA 1,3 GALLA**<br>**Skrás.:** 01-05-95 **Km.:** 139.000<br>**Prísur:** 87.600,- **Garanti*** Sýnaður 12/99 | **VOLVO 240 GL AUT.**<br>**Skrás.:** 04-06-86 **Km.:** 165.000<br>**Prísur:** 22.600,- |

**VØRUVOGNAR**

| | |
|---|---|
| **TOYOTA LANDCRUISER 4,0 TURBO**<br>**Skrás.:** 20-10-88 **Km.:** 159.000<br>**Prísur:** 99.600,- Sýnaður 8/00 | **NISSA PATROL 4x4**<br>**Skrás.:** 01-07-89 **Km.:** 197.000<br>**Prísur:** 55.600,- Sýnaður 12/98 |
| **TOYOTA DYNA 150 V/LAST**<br>**Skrás.:** 24-02-97 **Km.:** 100.000<br>**Prísur:** 90.600,- | **MITSUBISHI PAJERO 4x4 STUTTUR**<br>**Skrás.:** 22-10-86 **Km.:** 238.000<br>**Prísur:** 38.600,- Sýnaður 7/00 |
| **TOYOTA LANDCRUISER 2,4 DIESEL**<br>**Skrás.:** 05-11-86 **Km.:** 230.000<br>**Prísur:** 48.600,- | **FORD COURIER DIESEL**<br>**Skrás.:** 22-05-94 **Km.:** 91.000<br>**Prísur:** 48.600,- |
| **TOYOTA HILUX 4x4 DUP. CAP**<br>**Skrás.:** 03-08-95 **Km.:** 68.000<br>**Prísur:** 120.600,- | **VW LT 35 VAN**<br>**Skrás.:** 30-06-93<br>**Prísur:** 39.600,- |

**AVHEINTINGARTILBOÐ**

| | |
|---|---|
| **TOYOTA CARINA 1,6 XL SEDAN**<br>**Skrás.:** 19-10-87 **Km.:** 175.000<br>**Prísur:** 7.000,- Sýnaður 10/98 | **FORD ESCORT**<br>**Skrás.:** 14-03-88 **Km.:** 177.000<br>**Prísur:** 9.000,- Sýnaður 3/99 |
| **TOYOTA CARINA 1,6 XL L/B**<br>**Skrás.:** 08-10-87 **Km.:** 248.000<br>**Prísur:** 15.000,- Sýnaður 11/98 | **FORD ESCORT 1,6 AUT.**<br>**Skrás.:** 03-11-88 **Km.:** 58.000<br>**Prísur:** 9.000,- Sýnaður 6/99 |
| **HONDA ACCORD**<br>**Skrás.:** 09-04-87 **Km.:** 179.000<br>**Prísur:** 14.000,- Sýnaður 5/98 | **OPEL ASCONA 1,6**<br>**Skrás.:** 01-01-87<br>**Prísur:** 3.000,- |
| **NISSAN BLUEBIRD**<br>**Skrás.:** 12-06-87 **Km.:** 157.000<br>**Prísur:** 12.000,- | |

* Brúktir bilar yvir 75.000 kr. verða seldir við BRÚKTBILAVÁTTAN
** TOYOTA bilar hava 3 ára garanti frá fyrstu skrás. dato

**REYNI SERVICE**

Opið: Mán.-frí. 8.00-17.00




Vegurin Langi -188 Hoyvík - Tel. 313040

Sosialurin - 311820